## DAGSINS MEINING

# Nýggjar sjúkrasengur

Tað er ikki óvanligt fyri val, at tingmenn leggja fram paraduuppskot sum valagn fyri at tekkjast veljarunum. Men vit skulu ávara móti at útleggja uppskotið hjá tingmanninum Krisjan Magnussen um at keypa sengur til Landssjúkrahúsið sum eitt slíkt. Tí tað meta vit tað ikki at vera. Her rakar tingmaðurin við eitt øki, sum er forsømt og sum vit ikki minst við teimum góðu tíðunum eiga at geva størri ans. Tað er tí at vóna, at uppskot hansara um at keypa nýggjar sengur til Landssjúkrahúsið fær fulla undirtøku í tinginum.

Hetta er eitt uppkot tey á Landssjukrahúsinum hava bíðað eftir í fleiri ár. Sengurnar eru gamlar, summar meira enn 40 ár. Tær virka ikki sum tað skulu, hjólini standa føst og bremsurnar virka ikki. Tá verskaðurin herfyri skuldi bíleggja eykalutir fingu tey at vita, at hesir eru als ikki til. Tvs. at tað er í tøkum tína, at okkurt verður gjørt. Og tí er tað eitt kærkomið uppskot at keypa nýggjar sengur til alt sjúkrahúsið.

Støðan er ótolandi hjá bæði starvsfólki og sjúklingum, tí tað m.a. er nógv óneyðug lyfting. Hetta kemur sjálvandi ikki væl við, tá hugsað verður um, at starvsfólkini eftir kreppuna í 90-unum vórðu tvingað til at renna nógv skjótari. So hetta hevur verið steinur omaná byrðu og hevur ført til nógvar sjúkradagar, tá ryggar ganga fyri.

Seinastu árini hevur stór menning verið á hesum øki, har sengur er elriknar, sum ger tað munandi lættari bæði hjá sjúklingum og starvsfólki. Og skulu vit teljast millum fremstu heilsuverk í heiminum mugu vit eisini hava nútímans útbúnað. Tá sengurnar eru komnar eigur næsta stig at vera at játta pengar til koyristólar, náttborð og annan útbúnað, sum eisini eru í syndarligum standi.

Vilja tingmenn koma við skilagóðum uppskotum undan valinum, so skulu tað vera slíkt sum hesi, men hetta krevur so eisini, at somu tingmenn, sum leggja slíkt uppskot fram, eisini megna at liva upp til henda setning eftir valið og her ikki minst um teir koma at stýra landinum. Føroyaska heilsuverkið eigur at raðfestast hægri og vit kunnu so bara vóna, at tann blokkniðurskurður, sum landsstýrið hevur gjørt, ikki fer at nerva komandi menning av sjúkrahúsverkinum. Men verða verri tíðir og tað vita vit av royndum er ein sannroynd, so kann vera, at nettupp stóri blokkniðurskurðurin kemur at verða ein forðing fyri at kunna menna og nútíðargera okkara sjúkrahúsverk. Gjørd gerð fær tó onga vend, men neyvan verður møguligt at halda fram við slíkum niðurskurðum komandi árini, og skulu vit velja millum at skerja blokk og at menna sjúkrahúsverkið, so velja vit tað seinna. Blokkskerjing má ikki verða uppá bekostning av einum ambuteraðum sjúkrahúsverki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Starvsmannafelagið:

# Viðvíkjandi ósemjum á arbeiðsmarknaðinum, lagdar til Fútarættin

**Gunnleivur Dalsgarð**
*formaður*



Í sambandi við ósemju millum Føroya Handverksmeistarafelag (FH) og Landsfelag Handverkaranna (LH), hevur FH lagt málið fyri fútarættin.

Vit fara staðiliga at heita á Fútarættin, um at vísa málinum frá sær, við tí grundgeving, at Fútarætturin ikki eigur ella kann taka støðu í einum slíkum málið.

Í øðrum londum verða slíkar ósemjur viðgjørdar í einum arbeiðsrætti eftir serligum reglum. Slíkar arbeiðsrættarligar reglur galda ikki í Føroyum, og ætlanin við fútaforboð eftir rættargangslógini hevur ikki verið, at hetta skal brúkast til arbeiðsrættarligar trætur av hesum slagi.

Viðmerkjast skal, at spurningurin um at seta skipanina við arbeiðsrætti í gildi í Føroyum, sum vit kenna ml.a. í Danmark, hava flestu fakfeløgini í Føroyum avvíst, meðan vit harafturímóti hava lagt uppskot fram um skipan av viðkaðum gerðarrætti, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum semjast um. Hetta mál er ikki loyst enn.

Vit fara tí eisini at boða frá og staðfesta, at vit fara ikki at góðtaka tann praksis, sum hevur vundið upp á seg við at Fútarætturin steðgar lógliga rætti fakfelaganna til at taka stig, tá sáttmálin verður brotin, og vilja vit eisini taka stig til at hindra, at hendan mannagongd sleppur inn á okkara sáttmálaøki.

# Marjus Dam, samgongan hevur veitt skattalættar

**Kaj Joensen**
*grannskoðari*

Sambandsmaðurin Marjus Dam hevur júkað upp ísaman um tvey ting, annað er fullveldi hitt er skattalætti.

Ì Dimmu tann 9 februar 2002 skrivar hann soleiðis " À hesum øki er at kalla onki hent hetta samgonguskeið.

Fíggjarmálastýrið hevur gjørt eina búskaparfrágreiðing í samband við Løgtingsfíggjarlógina fyri 2002. Har er ein talva 14, sum eitur skattalættar í hesum valskeiðnum

| | |
|---|---|
| Persónar | kr. 81.000.000 |
| Pensjónistar | kr. 30.000.000 |
| Barrnafrádráttur | kr. 20.000.000 |
| Partafeløg | kr. 53.000.000 |
| Tilsaman | kr. 184.000.000 |

So Marjus Dam nakað er hent , meðan fullveldismaðurin Karstin Hansen hevur verið fíggjarmálaráðharri, eg má geva mínum góða floksfelega Høgna Hoydal rætt, hann er tann besti vit hava haft .

So ert tað hitt málið, fullveldi hvussu er so støðan .

| | |
|---|---|
| Mett avlop 2002. | kr. 18.000.000 |
| Avdráttir | kr. 141.000.000 |
| Rentur útland | kr. 200.000.000 |
| Íløgur | kr. 232.000.000 |
| Minking blokk | kr.356.000.000 |
| Tilsaman | kr. 947.000.000 |

Heildarveitingingin var 998 mill. í ár 2001 og er í ár 2002 bert 642 mill. So Marjús Dam sjálvt um vit minka blokkin við 356 milliónum so kunnu vit gerða íløgur fyri 232 mill.gjalda rentur 200 mill. og avdráttir 141 mill. ella tilsaman 573 mill..

So kundi ein spurt hvussu stendur til peningaliga ídag

| | |
|---|---|
| Landsbankin | 2,5 milliarfir |
| Grunnar almennir | 2,0 milliardir |
| Partafeløg ogn hjá landinum mett | 2,5 milliardir |
| Tilsaman | 7,0 milliardir |
| Skuld til Dk | kr. 3,6 milliardir |

Vit gjalda ídag 323 millionir í lánsgjald til Danmark, so her eru møguleiga at minka um ognirnar og gjalda skuldina niður, so er bæði pláss til skattalætta og at yvirtaka málsøkir.

Við fullveldisgongdini er ætlanin bæði at veita skattalætta og betra um vælferðina, men vit vilja hava ein sjálvberandi buskap og hann er ikki ringur at fáa eyga á .

Sjálvt danski Statsministarin skilti hetta, men sambandsmenn og javnaðmenn vilja ikki skilja hetta og síggja veruleikan sum hann er.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Eyðólv Dimon í Sosialinum 16. februar 2002

**Elin Henriksen**

Eingin kann vera ósamdur í, at fólkaskúlanum tørvar meiri pening fyri at lúka tey krøv, sum verða sett honum, m.a. í fólkaskúlalógini. Tað hevur bara einki við eina fnískúlalóg at gera.

Hvørji eru tey »vit«, sum Eyðólv Dimon heldur ætla at »seta á stovn privatar skúlar«? Beint aftaná skrivar hann aftur um somu »vit«, sum hann vantar fara at »býta játtanina út á fleiri skúlar«.

Tey, sum játta pening til fólkaskúlar, eru almennir myndugleikar: Land og kommunur, løgting, bygdaráð og umsiting teirra. Men hesi hava avgjørt einki at gera við at seta á stovn privatar skúlar – ella fríškúlar. Tvørturímóti – eyðkennið fyri fríškúlar er, at teir verða stovnaðir og riknir av privatum: Foreldrum, lærarum og møguliga áhugafelagsskapi. Um tað almenna skuldi stovnað fríškúla, so var tað eingin fríškúli longur, og enn minni nakar privatskúli.

Uppgávan hjá løgtinginum viðv. fríškúlum er at samtykkja eina fríškúlalóg; og tað kann metast sum ein dagføring av føroyska lógarverkinum, sum átti at verið framd fyri fleiri áratíggjum síðani.

Rætturin at skipa fríškúlar er staðfestur í fleiri altjóða sáttmálum – sum eisini Føroyar hava tikið undir við. Og tað er hesin rættur, ið skal tryggjast, við at løgtingið samtykkir eina fríškúlalóg. So fáa vit at síggja, um nakar fer at gera nýtslu av hesum rætti.

# Samfelagið endar í sori

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Samgongan sigur ferð eftir ferð, at støðan í føroyska samfelagnum ongantíð hevur verið so góð sum nú!

Vit, sum sita á síðulinjuni, hava ferð eftir ferð gjørt vart við, at soleiðis er veruleikin bara ikki.

Vanliga verður eitt samfelag gjørt upp eftir, hvussu tey veikastu hava tað, tað vil siga børnini og tey gomlu.

Og ikki nýtist einum langa tíð til at sláa fast, at á tí økinum eru Føroyar at líkna við mest afturkomnu londini í heiminum.

Hóast stóran búskaparligan framburð, so hevur samgongan ikki fingið eitt einasta røktarheims- ella umlættingarpláss aftrat.

Og barnaansingina slapp samgongan sær av við, og legði málið til kommunurnar at loysa.

Samstundis hevur samgongan sett íløguloft í gildi fyri kommunurnar.

So hóast kommunurnar kundu hugsað sær at loyst barnaansingartørvin, sum er størstur í Suðurstreymoy, so gevur samgongan ikki loyvi til tað.

Hyggja vit eitt sindur longur fram í tíðina, so eri eg ikki í iva um, at tað verður ein torfør uppgáva hjá kommununum at loysa barnaansingartørvin, um bert kommunan og foreldrini skulu gjalda.

Tað næsta, sum samgongan fer at áleggja kommununum at loysa, er eldraøkið. Har er ein sera stórur tørvur, og hóast kommunurnar eru meira hugaðar at loysa tørvin enn landið tykist at vera, so forar íløguloftið eisini fyri tí.

Tað, sum er so ómetaliga trist at síggja, er, at samgongan í øll hesi 4 árini, bert hevur havt eittans endamál, og tað er fullveldi. So gott sum øll onnur mál liggja á láni, og bíða eftir einari nýggjari samgongu.

Vónandi tekur veljarin sær um reiggj á løgtingsvalinum, so aðrar kreftir koma framat. Kreftir sum hugsa um samfelagið og trivnaðin hjá øllum borgarm.

Vit í Sambandsflokkinum eru í øllum førum til reiðar at stjórna landinum - til frama fyri øll.

# Vælkomin til Føroyar!

**Rógvi Borðoy**

Í hesum døgum verður tosað nógv um at Føroyar innan eitt ár er farið hava yvirtikið útlendingastýrið, sum annars er danskt burturav. Tað er ein góð nýggjheit hjá øllum teimum sum standa føst í stirvna kontórveldinum Udlændingestyrelsen. Undirritaði hevur sjálvur havt stórar trupulleikar við einari umsókn, og mong onnur munnu vera í somu støðu. Men hetta er ein yvirtøka sum má og skal planleggjast væl og virðiliga, áðrenn sett verður í gongd. Man eigur at líta á hini Norðanlondini og læra av teirra feilum. Serliga hugsi eg um Danmark, har útlendingarnir t.d. ikki kunna brúka útbúgvingina teir hava við heimanífrá. Eisini vera flóttafólkini "ghettoiserað" í sama íbúðarkompleks, so tey veruliga hava ein stat í statinum. Tað gevur teimum ongan tørv ella áhuga í samfelagnum teir liva í, og vera tí aldrin integreraðir. Tey elstu fólkini sum koma læra t.d. ikki málið og heldur ikki mentanina at kenna, og tað kann elva til eina óskylduga men álvarsliga rasismu, tí tey ikki eru "føroysk" á nakran hátt. Tá er best at vit læra okkum at síggja tey í dagliga degnum og góðkenna at tey eru her beinanvegin.

Krav eigur at vera um integratión. Ikki eitt krav um at tey skula gloyma hvørji tey eru, men at tey læra føroyska mátan at hugsa, og hvussu vit skilja okkum frá øðrum fólkasløgum. Málið er eisini ógvuliga umráðandi. Føroyingurin hevur beinanvegin hug at tosa teirra mál, men tað eiga vit bert at gera um vit fara til fremmand lond. Her á landi tosa vit føroyskt og ikki enskt. Tað skal eisini vera ómøguligt at fáa permanent uppihaldsloyvi, um útlendingar ikki hava klárað at lært málið bæði í skrift og talu.

**Skjótt og kontant**

Niðri er vanligt at umsøkjarin bíðar einar 6-8 mánaðir og í ringastu førum eitt ár áðrenn avgerðin kemur. Tað ger tað sera tungt bæði búskaparliga tí ein ikki kann arbeiða, og kensluliga tí ein er "ósjónligur" og ikki eingong hevur pass meðan umsóknin verður viðgjørd. Eg veit ikki um hetta er ein teknikkur fyri at útlendingar ikki skula tíma og orka at søkja, men teknikkurin virkar ikki. Til dømis hevði Danmark ein trupulleika serliga við russum, ið væl vistu at teir ikki fingu uppihaldsloyvi, men ætlaðu at liva tað góða lívið uppá statsins rokning teir 6-8 mánaðirnir tað tók. Eisini komu teir fyri at ríka seg upp við stolnum vørum og øðrum milt sagt ivasomum fyritøkum. Hesi "interessuflóttafólkini" eiga at vera víst út beinanvegin, tí svarið verður noktandi hóast alt.

Tað sama er galdandi fyri útlendingar sum eru giftir við føroyingum. Hevur man pappírini í lagi verður svarið játtandi, og tað má gevast skjótast gjørligt, tí útlendingurin hvørki lærir føroyskt ella arbeiður meðan hann bíðar. Føroyski parturin av ektaskapinum hevur eina stóra pengabyrðu, tí útlendingurin onga inntøku hevur, og tveir munnar eta meir enn ein.

**Tungt at dansa**

Nógvir føroyingar eiga at fáa hjálp beinanvegin við Udlændingestyrelsen. Okkara sakir fáa lægsta prioritet í Danmark, har teir siga at pressið er so stórt og aðrar láturligar umberingar. Eisini er tað fullkomiliga ógjørligt at gera um seg, tí við at venda sær til Ud lændingestyrelsen seinkar ein bara sakini. Sendir man so eina formella klagu til Bertel Haarder seinkar tað eisini sakina. Tað mest láturliga av øllum er at landsstýrið hvørki kann ella vil hjálpa til, tí teir bert eru áskoðarar í dystinum. Vit – gíslarnir – liva so í okkara Kafka'sku verð og renna høvdið í veggin ferð eftir ferð og hava ongan at heita á. Tí vil eg siga við Høgna Hoydal varaløgmann: hjálp serliga teimum sum eru gift við útlendingum, tí serliga hesar sakirnar verða súltaðar.

**Donsk krøv í Føroyum**

Fleiri føroyingar kunna ikki fáa svar, tí eitt danskt skrivstovufólk ikki kennur til føroyskar umstøður. Undirritaði fekk eitt bræv frá Udlændingestyrelsen um at eg ikki kundi fáa svar, tí eingin databasa er í Føroyum sum avdúkar støddina á íbúðini eg búgvi í. Tvs. at føroyska sosiallógin skal fullkomiliga umskapast áðrenn svarið kemur. Har má landsstýrið vera ambassadørur og fáa loyst trætumálið. Landsstýrið eigur beinanvegin at gera greitt fyri málsviðgerunum hvat er og ikki er galdandi fyri Føroyar, tí teir ána ikki hvat Føroyar eru og hvussu lógirnar eru. Føroysku sakirnar vera tí viðgjørdar sum verandi danskar, og so slær bremsan í.

**Gott at liva**

Vit skula minnast til at integrera og fáa fólkini í gongd beinanvegin. Politikkurin á økinum eigur at vera gjørdur soleiðis, at tað er lokkandi at læra livimátan og marknaðin at kenna. Vit muga eisini læra okkum at góðtaka tey sum sleppa inn, og ikki vera freistaði at gera mismun. Fleiri innflytarar í Danmark kunna ikki fáa arbeiði tí teir eita Muhammed, men um teir ringja og siga seg eita Benny so er alt í lagi. Hendan dulda rasisman er óhugnalig at hoyra um, og eggjar avgjørt ikki til at integrera seg. Tvørturímóti gevur tað eina "vit og tey" uppfatan av samfelagnum, og tað er tað síðsta vit hava brúk fyri.